Stórur áhugi fyri eldrastevnuni

Fleiri enn 300 fólk leitaðu sær í Norðurlandahúsið í farnu viku, tá ið eldrastevna var á skránni

ELDRASTEVNA

Terji Nielsen
terji@sosialurin.fo

Stevnan var í sambandi við, at tað í komandi mánað er val til eitt sonevnt eldraráð í Havn.

Tað var Tórshavnar Býráð, sum skipaði fyri stevnuni, og forkvinnan í sosialu nevnd hjá býráðnum, Katrin Dahl Jakobsen, letur væl at stevnuni.

- Tað vóru heilt nógv fólk á stevnuni, og eg haldi, at vit kunnu siga, at tað var ein ógvuliga góð blanding av fólki, tí talan var ikki einans um eldri fólk, sigur Katrin Dahl Jakobsen.

Bent Rold Andersen á Eldrastevnuni í Norðurlandahúsinum í farnu viku

Føroyar kunnu gerast slóðbrótandi á eldraøkinum

Millum teirra, ið hildu fyrilestur á eldrastevnuni, var danski professarin, Bent Rold Andersen, ið er ógvuliga virkin á eldraøkinum í Danmark.

Danski professarin og fyrrverandi vísmaðurin heldur, at um eldraráðið, ið Tórshavnar Býráð fer at seta á stovn, kemur at virka eftir endamálinum, verður tað ein heimssensatión.

- Um eldraráðið kemur at virka soleiðis, at tað kann ráðgeva býráðnum við ymiskum, sum bert tey eldru kenna til, so verður tað slóðbrótandi fyri eldrapolitikk á heimsbasis, heldur Bent Rold Andersen.

Hann vísir á, at í flest øllum býráðum bæði her á landi og aðrastaðnis sita ógvuliga fá gomul fólk, og tí væntar kunnleikin til hetta øki.

- Allir politikkarar hava verið børn, og teir flestu eiga eisini børn. Tí kenna politikkarar til hesi øki, men teir vita einki um, hvussu tað er at verða gamal. Tí kann tað verða ógvuliga umráðandi at hava eitt eldraráð, ið kann ráðgeva, sigur Bent Rold Andersen.

Danski professarin sigur seg verða ovfarnan av tí stóra áhuganum fyri eldrastevnuni í Føroyum, og hann leggur afturat, at tað var serstakliga hugaligt at síggja, at tað vóru fólk í øllum aldri, ið vóru við til stevnuna.

Norrøna aftur í dokk á nýggjárinum

Síðst í farna mánað var Norrøna í dokk í Danmark at fáa umvælt annan stabilisatorin, men arbeiðið gjørdist ikki liðugt, og tí skal Norrøna aftur í dokk um ársskiftið

UMVÆLING

Terji Nielsen
terji@sosialurin.fo

Jógvan í Dávastovu, trygdarleiðari hjá Smyril Line, sigur, at tað er stýriborðsstabilisator, ið tað er galið við, sum tað eisini hevur verið megin partin av summarsiglingini hjá Norrønu.

Onga ávirkan á trygdina

- Vit hava tó framvegis stabilisatorin í bakborð, og tað merkir, at vit framvegis hava eina stabilisatoreffekt upp á okkurt um 60-70 prosent, sigur Jógvan í Dávastovu.

At annar stabilisatorin ikki virkar hevur tó onga ávirkan á trygdina, tí hann hevur ikki einki við trygdina hjá skipinum at gera. Talan er bert um ein spurning um komfort, leggur Jógvan í Dávastovu dent á.

Norrøna skal hesaferð í dokk í Hamburg í Týsklandi, og tað verður sjálvan nýggjársaftan. Skipið fer í sigling aftur leygardagin 7. januar 2006.

SPENNANDI STØRV Í
KAUPTHING

Kaupthing stendur í vøkstri, og tí leita vit eftir dugnaligum og framsøknum starvsfólkum, sum hóska til væl skipaða starvsfólkalið okkara. Í fyrstu atløgu søknast vit eftir einum umsitingarligum leiðara og tveimum starvsfólkum til útlánsvirksemi.

UMSITINGARLIGUR LEIÐARI

Við tilvísing til stjórnin hevur umsitingarligi leiðarin ábyrgdina av dagligu umsitingini í felagnum, sum mennist sera nógv. Hetta merkir, at tú fært ábyrgd av at:
* gera hálvárliga og árliga roknskapin
* røkja dagliga bókhaldið og roknskapin
* avrokna í sambandi við virðisbrævahandil
* samskifta við kundar
* stýra gjaldførinum
* vera um starvsfólkini
* umsita tað, ið fyri fellur
* hava eftirlit við innanhýsis mannagongdum.

Vit vænta, at tú:
* megnar at hava skil á mongum viðurskiftum í einum
* orkar at bera byrðuna, hóast hon stundum er tung
* torir at arbeiða sjálvstøðugt
* krevur úrslit av tær sjálvum og tínum starvsfelagum
* dugir væl at samstarva
* hevur hóskandi hægri útbúgving og arbeiðsroyndir.

Harumframt halda vit tað vera týdningarmikið, at tú dugir væl enskt í skrift og talu, at tað fellur tær lætt at seta teg inn í nýggj viðurskifti, og at tú hevur hugsjónarligar tankar um, hvussu felagið kann mennast frameftir.

Vit bjóða tær:
* oddastarv við stórum avbjóðingum á høgum yrkisligum stigi
* týðandi sess í livandi fyritøku, sum alsamt mennist eftir altjóða listi
* møguleika at vera lyklapersónur í hesi menning
* góða løn, sum verður avtalað serstakt.

STARVSFÓLK TIL ÚTLÁNSVIRKSEMI

Vinnutænastuøkið og harvið eisini vinnulánsøkið hjá Kaupthing er vaksið og ment munandi seinastu tíðina, og vit søknast tískil eftir tveimum fólkum at arbeiða við vinnulánum.

Við tilvísing til leiðaran á vinnudeildini skalt tú:
* finna fram nýggj kundaevni og samskifta við tey
* røkja verandi kundar og veita teimum ráð um fígging og onnur fíggjarlig viðurskifti
* Hjálpa verandi og komandi kundum at avgreiða lánsmál og onnur fíggjarlig mál.

Vit vænta, at tú:
* velur ílit
* megnar at skapa virðing fyri tær sjálvum og starvinum
* ert útvendur og lættur at samskifta við
* dugir væl at arbeiða sjálvstøðugt
* trívist í avbjóðingum
* hevur lætt við at seta teg inn í nýggj viðurskifti
* dugir væl enskt í skrift og talu.

Tað er ein fyrimunur men ongin treyt, at tú hevur hóskandi hægri útbúgving. Hinvegin er tað ein treyt, at tú hevur arbeiðsroyndir, sum hava týdning.

Vit bjóða tær:
* avbjóðandi starv á yrkisliga høgum stigi í livandi felagi, sum mennist støðugt
* góðan samstarvsanda í spennandi og mennandi umhvørvi við altjóða menningarmøguleikum
* góða løn, sum verður avtalað serstakt.

Hevur tú okkurt at spyrja um í sambandi við leysu størvini á Kaupthing, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Peter Holm, stjóra.

Umsóknir skulu áðrenn 4. november sendast til:

KAUPTHING

Kaupthing Virðisbrævameklarafelag p/f
Tinghúsvegur 14
Postsmoga 3090
110 Tórshavn
Telefonnummar: 351500
Heimasíða: www.kaupthing.fo